# Íløguavtala

**TRYGGINGARFELAGIÐ LÍV**
Postboks 206
Kopargøta 1
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 31 11 11
liv@liv.fo
www.liv.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Navn** | | | **Tryggingar nr.** |
| **Bústaður** | | | |
| **Telefon** | **Fartelefon** | **Teldupostur** | |

Við marknaðarrentu fært tú tann ágóða, sum marknaðurin gevur. Í góðum tíðum fært tú allan ágóðan av tí góðu gongdini. Ávís tíðarskeið er tó møguleiki fyri negativum avkasti, tá ið tað gongur minni væl.

Íløgurnar hjá LÍV kunnu býtast í trý: partabrøv, lánsbrøv og alternativar íløgur (t.d. fastogn ella undirstøðukervi).

Lutfallið millum íløgurnar er knýtt at tí váðastøði, tú vilt hava. So hvørt tíðin nærkast til, at tú fært uppsparingina útgoldnað, lagar LÍV sjálvvirkandi lutfallið til, soleiðis at íløguváðin lækkar.

Saman við tær finna vit títt váðastøði, ið er grundað á títt váðafýsni, aldur og eftirlønaraldur.

## Vel váðastøði

Eg vil áseta/broyta mítt váðastøði til tað, sum eg havi valt niðanfyri, og at valið skal fevna um allar mínar komandi inngjaldingar og mítt uppsparda virði.

### ☐ Varið

Miðað verður eftir, at uppsparda virðið verður sett í íløgur soleiðis:
**55% lánsbrøv, 45% partabrøv og alternativar íløgur.**

Váðastøðið hevur lutfalsliga stóran part av lánsbrøvum. Varið hevur avmarkaðan váða, men eisini eitt lágt væntað avkast. Tá 15 ár eru eftir til eftirlønaraldur, lækkar íløguváðin árliga.

### ☐ Miðal

Miðað verður eftir, at uppsparda virðið verður sett í íløgur soleiðis:
**23% lánsbrøv og 77% partabrøv og alternativar íløgur**.

Váðastøðið liggur millum "Varið" og "Høgt" váðastøði. Væntaða avkastið og váðin er tí eisini millum nevndu profilarnar.

Tá 15 ár eru eftir til eftirlønaraldur, lækkar íløguváðin árliga.

### ☐ Høgt

Miðað verður eftir, at uppsparda virðið verður sett í íløgur soleiðis:
**15% lánsbrøv, 85% partabrøv og alternativar íløgur.**

Váðastøðið hevur tann størsta partin av partabrøvum og alternativum íløgum. Høgt hevur eitt høgt væntað avkast, men eisini ein høgan váða.

Tá 15 ár eru eftir til eftirlønaraldur, lækkar íløguváðin árliga.

### ☐ Partabrøv

Miðað verður eftir, at uppsparda virðið verður sett í virðisbrøv soleiðis:
**100% partabrøv.**

Váðastøðið hevur bara partabrøv. Partabrøv hevur tí tað hægsta væntaða avkastið, men samsvarandi eisini størsta váðan.

Váðin lækkar ikki, sama hvat útgjaldsárið er.

### ☐ ESG

Miðað verður eftir, at uppsparda virðið verður sett í íløgur soleiðis:
**40% lánsbrøv og 60% partabrøv.**

Váðastøðið er sett saman av láns- og partabrøvum, ið eru grundað á eina sokallaða ESG ætlan. Tað merkir, at peningurin verður settur í fyritøkur og verkætlanir, ið taka ábyrgd – ikki bert fíggjarábyrgd, men eisini umhvørvis-, samfelags- og leiðsluábyrgd.

Tá ið 15 ár eru eftir til pensjónin verður útgoldin, lækkar íløguváðin árliga.

***Verður einki valt, ella er valið ógyldugt, verður váðastøðið sett til 100% Miðal.***

# Íløguavtala

**TRYGGINGARFELAGIÐ LÍV**
Postboks 206
Kopargøta 1
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 31 11 11
liv@liv.fo
www.liv.fo

Valið fær virknað tann 1. í mánaðinum eftir, at LÍV hevur fingið tað útfylta skjalið. Íløgur og broytingar verða gjørdar samsvarandi íløgutreytunum hjá LÍV, ið eru at finna á **www.liv.fo**

## Eg vátti við mínari undirskrift niðanfyri at:

– eg havi fingið vegleiðing og ráðgeving frá LÍV um tey ymisku váðastøðini, og hvørjir váðar eru við teimum ymisku støðunum.

– eg havi vigað míni ynski og væntan um avkast í mun til váðan fyri tap, og at tað eri eg, sum havi valt mítt váðastøði og sostatt, hvussu mín eftirløn skal investerast. Mín eftirløn kann tí hækka og lækka. LÍV kann ikki ábyrgdast fyri møgulig tap.

– eg veit, at tær forsagnir, sum eg havi fingið um framtíðargongdina í íløgunum, byggja á greiningar av búskaparligum faktorum, og at forsagnirnar eru eingin trygd fyri, at gongdin verður soleiðis, sum forsøgnin sigur. Eg kann tí einki krav gera galdandi móti LÍV, um so er, at veruliga gongdin verður verri enn forsagnirnar ella mín egna væntan,

– eg havi fingið at vita, at eg eigi at gera nýggja meting av mínum egna váða- og váðastøði í minsta lagi fimtahvørt ár og í øllum førum, tá ið eg fylli 50, 55 og 60 ár, ella um míni lívsviðurskifti broytast (t.d. hjúnalag, børn ella hjúnaskilnaður), og

– eg havi fingið útflýggjað eitt avrit av galdandi íløgutreytunum hjá LÍV, og at eg við hesum góðtaki íløgutreytirnar.

# Dato og undirskrift

| | |
|---|---|
| **Dato** | **Undirskrift** |